

*Fremsti bilurin er ein danskt bygdur Joker frá 1973. Leggið til merkis at forlyktirnar og hjólini eru frá Volvo 140-seriuni fyrst í 70-unum*

# Klassiskir bilar

**Eins og í síðstu viku hava vit aftur hesa vikuna vitjan av ellisakførum á donskum nummarplátum. Talan er um limir í Dansk Veteranbil Klub, sum eru komir higar við flottum klassiskum bilum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Vit hava í hesum døgum vitjan av einum ferðalagi við ellisakførum. Tað eru limir í Dansk Veteranbil Klub, sum eru komir higar við 12 ymiskum vælhildnum gomlum bilum. Dansk Veteranbil Klub er ein gamal felagsskapur, sum varð stovnaður í 1954.

Ferðaleiðari á túrinum er Erik Fey, sum eisini var ferðaleiðari á Morgan vitjanini í síðstu viku. Erik hevur ferðast nógv í Føroyum sum ferðaleiðari og hevur skrivað fleiri bøkur um føroyska list.

Bilarnir eru ein blanding av ymiskum merkjum sum t.d. Austin Seven, Volvo PV, Morris Minor, Citroën Traction Avant, og fleiri sløg av Mercedes-Benz cabriolet. Tann mest sermerkti bilurin er tann guli danskt bygdi Joker frá 1973. Bert sjey bilar vórðu gjørdir av hesum slagnum, sum tekniskt og mekaniskt eru Volvo bilar.

Gomlu bilarnir hava koyrt nógvastaðni kring landið. Tey hava verið mest í Streymoy, Eysturoy og í Norðoyggjum. Ferðalagið fer avstað aftur við Norrönu í annaðkvøld. Samrøða er við fleiri av eigarunum av ellisakførunum í Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05.



*Ferðaleiðari á túrinum er Erik Fey, sum eisini var ferðaleiðari á Morgan vitjanini í síðstu viku*



*Mercedes-Benz 190 SL frá 50-unum*



*Austin Seven frá 1936 og ein Mercedes-Benz 190 SL*



*Citroën Traction Avant frá 1952 og ein Volvo P445 Duett frá 1959*

# Lyftibilur

TÍÐINDASKRIV

Elinnleggjarafelagið El-net hevur júst keypt eina mannskapslyftu frá KJ-Hydraulik. Talan er um ein Nissan Capstar bil við einum Bison-Palfinger krana, sum er einastandandi á tann hátt, at hann gevur eina arbeiðshædd uppá yvir 20 metrar, og hóast vælútgjørdur, so tørvar føraranum bara vanligt koyrikort at koyra hann. Lyftan virkar soleiðis, at bummurin verður skotin út - hann verður altso ikki lagdur saman, sum ofta sæst við slíkum lyftum. Haraftrat er hann soleiðis gjørdur, at allar funksjónirnar kunnu virka samstundis, óbundnar hvør av øðrum.

El-net er eitt elinnleggjarafelag við deildum í Havn og í Vestmanna við 12 elektrikarum á lønarlistanum. Felagið hevur úr at gera við elinnlegging, bæði í sethúsum, skrivstovubygningum og skipum. Ein partur av arbeiðnum umfatar m.a. røkt og viðlíkahald av gøtuljósum, sum felagið hevur avtalu við nakrar kommunur um, umframt at felagið eisini tekur sær av fasaduljósum, ljósskeltum og antennum.

Bernhard Petersen, stjóri í felagnum, sigur, at seinastu nevndu arbeiði eru vorðin fleiri í tali seinastu tíðina, og tí varð avgjørt at keypa eina mannskapslyftu. Hesin bilurin nøktar allan tørvin og væl aftrat og er einastandandi lættur at arbeiða við, sigur hann. Ein Capstar, soleiðis útgjørdur sum hesin, fæst fyri slaka hálva miljón frá KJ-Hydraulik.



*Nissan Capstar hjá El-net við Bison-Palfinger krana*